# Føroya Landsbókasavn



# Ársfrágreiðing 1998-1999

# Føroya Landsbókasavn

# Ársfrágreiðing

# 1998 og 1999



Tórshavn
2000

| | |
|---|---|
| Forsíðumynd: | Føroya Landsbókasavn<br>Tekning: J.P. Gregoriussen, 1997 |
| Prent og innbinding: | Føroya Landsbókasavn |
| Perma: | Einars Prent |
| Lagt til rættis: | Rannvá Hanusardóttir, Martin Næs og<br>Hans Jákup av Skarði |

ISBN 99918-61-04-1

# I N N I H A L D S Y V I R L I T

síða

Framasøkin .......... 4

BÓKASØVN
- Føroya Landsbókasavn .......... 5
- Fólkabókasøvn .......... 6
- Býarbókasavnið .......... 6
- Skúlabókasøvn .......... 7
- Bókasavnsgjaldið .......... 7
- Mikrofilmar .......... 8

Bókmentavirðislønir .......... 9

BÓKAÚTGÁVA .......... 9
- Týðingar .......... 10
- Prentingin .......... 10
- Útgevarar .......... 11
- Bløð og tíðarrit .......... 11
- Avísir .......... 11
- Fløgur og bond .......... 11

Birni Durhuus: Norðurlendska bókasavnsvikan 1998 .......... 12
Marjun Patursson: Ferðafrágreiðing frá kunningarferð til Noregs og Svøríkis 1998 .......... 14
Martin Næs: Ulf Zachariasen .......... 18
Gunnar Hoydal: Ein pottur av hvørjari tunnu .......... 21
Malan Marnersdóttir: Mentan og fullveldi .......... 24

BÓKASØVN - yvirlit .......... 29

TALVUR .......... 32

# Framasøkin

Fyri 12 árum síðan, í 1988, samtykti Føroya Løgting eina lóg, sum kallast Løgtingslóg fyri megin-, fólka- og skúlabókasøvn. Henda lógin varð sett í gildi ístaðin fyri eina aðra lóg á bókasavnsøkinum, ið tá hevði verið galdandi í 20 ár. Nevndin, ið gjørdi álitið til 1988-lógina, var stór, og hon arbeiðddi í eini 4 ár, áðrenn komið var so langt, at líkinda lóg var komin burtur úr arbeiðinum. Høvuðsendamálið við dagføringini av bókasavnslógini var, uttan at fara í smálutir, at veita eina betri bókasavnstænastu til allar landsins íbúgvar.

Øllum kunnugt brustu allar ætlanir í byrjanini av níti-árunum. Soleiðis var eisini á bókasavnsøkinum, og fólk slógu seg til tols við hesum og vónaðu, at hetta fór skjótt at hæsa av; tað snúði seg um at hava tol og at bíða.

Í Føroyum er bókasavnið eingin ársungi, og tilveran, hesin stovnurin hevur havt sum árini eru farin, hevur eisini verið misjøvn. Síðan 1828, tá ið bókasavnið varð sett á stovn, hava verið bæði rakár og góð ár. Í teimum góðu árunum gekk alt av sær sjálvum, og í rakárunum hóraði bókasavnið onkursvegna undan, tí her vóru so mong vælvildarfólk, sum hjálptu og stuðlaðu.

Henda ársfrágreiðingin hjá Føroya Landsbókasavni viðger eisini tað Harrans árið 1998, tað árið tá ið 170 ár vóru liðin síðan bókasavnið varð sett á stovn, ella við øðrum orðum sagt: 10 ár eftir at endurskoðaða bókasavnslógin varð samtykt. Vit gleddu okkum sum børn, tí nú mátti okkurt fara at henda. Tíðirnar vóru broyttar, endin av níti-árunum líktist als ikki byrjanini. Útlitið var bjartari.

Føðingardagsgáva ella ei, men eitt kommunuálit til landsstýrismannin í kommunumálum fingu vit hetta árið – í trimum bindum. Her var m.a. staðfest, at bókasavnslógin frá 1988 er ov framasøkin, og tí verða ynski sett fram um broytingar. Sum umboð fyri føroysku bókasøvnini haldi eg tað vera stak løgið av eini professionellari nevnd at skriva slíkt uttan at hava ráðført seg við tey, sum arbeiða á økinum. Í einari tíð, tá ið einki tykist bera til, spyrja vit okkum sjálv: er tað nú so mannminkandi at fáa heitið framasøkin? – Longu í 1988 arbeiðir sjálvt bókasavnslógin, sum Føroya Løgting sjálvt hevur samtykt, við at býta føroyska samfelagið upp í 7 meginøki. Nú tíggju ár seinni kemur kommununevndin og sigur nakað tað sama. Og lesur tú bókasavnslógina gjøllari, tekur hon grein fyri grein við mjúkari hond handskan upp fyri útjaðaranum í Føroyum, tíggju ár áðrenn orðið gjørdist føroyskt mótaorð.

Ein av skyldunum hjá Føroya Landsbókasavni er at hýsa tí prentaða, føroyska orðinum. Hesi seinastu árini eru fleiri hillametrar lagstir aftrat av álitum, lógum og vegleiðingum, ið lýsa og viðgera okkara samfelag bæði fyrr og nú. Tað mesta av hesum arbeiði er gjørt eftir áheitan frá tí politiska myndugleikanum. Bólkar og einstaklingar hava lagt nógva orku í hesar viðgerðir. Tíverri eri eg bangin fyri at hetta slagið av bókmentum ørkymlar tann politiska myndugleikan meira enn gott er. Tí spurningurin er, í hvussu stórum álvara teksturin verður lisin?

Nú, eftir at hava bíðað í meira enn 10 ár, var tað tí stak áhugavert at lesa í einum áliti frá fremstu embætismonnum landsins, at samtykta bókasavnslógin var ov framasøkin, og tí kann hon ikki fremjast í verki. Guð viti, hvat teir fara at siga, tá ið vit hava bíðað í 10 ár aftrat!

Martin Næs

# BÓKASØVN

## Føroya Landsbókasavn

Við heimastýrislógini varð bókasavnsmálið yvirtikið sum føroyskt sermál og Føroya Landsbókasavn, stovnað 1828 sum sjálveigandi stovnur, kom undir landsstýrið og fekk sambært lóg frá 1952 álagt sum landsbókasavn at savna allar føroyskar bókmentir og so mikið sum gjørligt av bókmentum um Føroyar. Haraftrat skal Landsbókasavnið sum megin- og vísindabókasavn "virka fyri útbreiðslu av kunnleika og upplýsing í landinum". Tað hevur eftirlit við fólkabókasøvnunum, býtir løgtingsstudningin og stendur eisini fyri bókakeypi og skráseting hjá teimum bókasøvnum, ið ikki sjálv hava útbúgvið fólk til hetta.

Prentsmiðjurnar hava lógfesta skyldu at lata Landsbókasavninum til avgreiðslu 4 eintøk av hvørjum prentluti. Harumframt hevur savnið rætt til eyka fríeintøk frá forløgunum at nýta í sambandi við bókabýti við útlendsk bókasøvn.

Í sambandi við Føroyadeild savnsins verður árliga føroyskur bókalisti gjørdur - ein skráseting av øllum tilfari, sum Landsbókasavnið hevur útvegað sær viðvíkjandi Føroyum. Síðan 1940 hevur Føroyskur bókalisti verið prentaður sum sjálvstøðug deild í Dansk bogfortegnelse. Tilfarið í Føroyadeildini er støðugt vaksandi. Hetta tilfarið verður bert lænt til nýtslu á lesistovuni, og hevði Landbókasavnið í 1999 1.626 (1.362)[1] lán úr Føroya- og handritadeildini.

Savnsins fíggjarætlan fyri 1999 var kr. 4.648.000 (4.286.000). Av hesum vóru kr. 628.000 (706.000) brúktar til keyp og innbinding av bókum, til blað- og tíðarritshald o.a.t.

Bókatalið á Landsbókasavninum var við árslok 1999 um 138.000 (135.000); av hesum eru um 20.000 á Vísindadeildini. Bókasavnið hevur harumframt tíðarrit og 520 (505) mikrofilmar av føroyskum avísum.

Í Føroyadeildini vóru við árslok 1999 um 13.500 (13.000) bøkur, 1.550 (1.500) handritapakkar, 1.490 (1.439) føroyskar plátur, ljómfløgur, kassettu- og sjónbond umframt smáprent og annað tilfar.

Fyrilestrarsalurin á Landsbókasavninum verður læntur stovnum, feløgum og einstaklingum til fundir, skeið, framsýningar og undirvísing. Í 1999 var fyrilestrarsalurin útlæntur í 82 (74) dagar.

### Útlán

Landsbókasavnið lænti 19.000 (18.870) bøkur út í 1999. Við árslok vóru 3.700 (4.400) fólk skrásett sum lánarar.

Frá 21. juni til 14. august vóru upplatingartíðirnar: mánadag-fríggjadag kl. 13-17.

[1] *tølini í ( ) eru samsvarandi tøl fyri 1998*

**Fólkabókasøvn**

15 fólkabókasøvn eru í Føroyum. 13 av teimum eru smá og hava bert opið nakrar fáar tímar um vikuna. Samlaða bókatalið á hesum bókasøvnunum liggur úr 3.800 upp í einar 15.000 bøkur.

Á hesum bókasøvnunum starvast ikki yrkisútbúnir bókavørðir. Landsbókasavnið keypir og skrásetir bøkur fyri hesi bókasøvnini.

Landskassin rindar 60% av rakstrarútreiðslunum hjá fólka- og skúlabókasøvnunum. Í 1999 vórðu játtaðar kr. 4.125.000 á fíggjarløgtingslógini, sum vórðu goldnar fólka- og skúlabókasøvnunum í rakstrarstudningi. Samlaði rakstrarstuðulin í 1999 var tó kr. 4.702.000. Føroya Landsbókasavn ávísir fólka- og skúlabókasøvnunum rakstrarstudningin.

**Býarbókasavnið** í Havn er størsta fólkabókasavnið. Á savninum eru 3 deildir:

- útlán
- lesistova
- barnabókasavn

Býarbókasavnið keypti 2.611 bøkur í 1999.

Útlæntar vóru 77.665 (69.901) bøkur; í hesum talinum eru 325 (268) bøkur frá útlendskum søvnum.

Á Býarbókasavninum er eitt savn við ljóðbókum á føroyskum og donskum. Teimum, ið ikki fáa lisið vanligar bøkur, stendur í boði at læna úr savninum. Hetta savnið verður nógv nýtt.

Býarbókasavnið hevur samstarv um útlán við Ellisheimið, Hvíldarheimið Naina, Lágargarð og Varðhaldið.

Barnabóksavnið hevur samstarv um útlán við barnagarðar, vøggustovur og dagrøktarskipan-ina.

Barnabókasavnið skipar fyri tiltøkum fyri børn upp til sjey ár. Hesi tiltøk í vetrarhálvuni eru væl vitjað.

11.695 (11.192) fólk hava lánarakort til Býarbókasavnið. Teir flestu lánararnir eru úr Havn. Men fólk á bygd, bygdabókasøvn og aðrir stovnar kring landið læna eisini á Býarbókasavninum.

84.652 (56.627) vitjanir vóru inn á bókasavnið í 1999.

Samstarv er millum Býarbókasavnið og 7 skúlabókasøvn í Tórshavnar kommunu. Skúlabókasøvnini hava í 1999 keypt 1.880 (1.999) bøkur: Argja skúli 320 (332), Eysturskúlin 328 (340), Hoyvíkar skúli 251(235), Kommunuskúlin 315 (338), Skt. Frans skúli 250 (241), Skúlin í Kaldbak 96 (168) og Venjingarskúlin 320 (345). Nógv tann størsti parturin er føroyskar bøkur.

Útlánið hjá skúlabókasøvnunum var tilsamans 77.444 (79.958) bøkur: Argja skúli 11.778 (11.532), Eysturskúlin 19.320 (17.643), Hoyvíkar skúli 8.837 (11.456), Kommunuskúlin 15.288 (15.483), Skt. Frans skúli 8.703 (9.132) og Venjingarskúlin 13.518 (14.712). Skúlin í Kaldbak hevur ikki talt útlánið í 1999.

Á bókasavninum starvast býarbókavørðurin, 3 bókavørðir fulla tíð, 2 bókavørðir ¾ tíð, ein bókavørður ½ tíð; 3 skrivstovufólk starvast fulla tíð, 2 skrivstovufólk ¾ tíð og 1 skrivstovufólk ½ tíð – tils. 13 fólk í 11 størvum.

**Skúlabókasøvn**

Landsbókasavnið hevur í 1999 ávíst 3 skúlabókasøvnum rakstrarstudning. Upp í hesi skúlabókasøvnini eru ikki roknað tey 7 skúlabókasøvnini í Tórshavnar kommunu, sum fáa rakstrarstudningin ávístan um roknskapin hjá Býarbókasavninum í Havn.

**Bókasavnsgjaldið**

Á fíggjarløgtingslógini fyri 1999 vórðu kr. 777.000 játtaðar til bókasavnsgjaldið. Fyri at fáa bókasavnsgjald skal høvundur í minsta lagi hava 50 eintøk á bókasøvnunum. Tann 31. desember 1998 høvdu 182 fólk fleiri enn 50 eintøk. Goldnar vóru kr. 518.000 fyri upprunaverk og kr. 259.000 fyri týðingar.

## MIKROFILMAR

Yvirlitið sýnir, hvørji føroysk dagbløð og onnur bløð Landsbókasavnið hevur á mikrofilmi. Hesir filmar kunnu bert brúkast á bókasavninum, og tað ber væl til at taka ljósrit av tí, ið brúkast skal.

| | |
|---|---|
| 14. September | 1947-1994 |
| Alt um ítrótt | 1985-1986 |
| Baldursbrá | 1906-1912 |
| Dagblaðið | 1934-1992<br>1994-1995<br>1998- |
| Dimmalætting | 1877- |
| Eysturoyggin | 1986-1992 |
| FF-blaðið | 1972-1974<br>1976-1989<br>1991- |
| Fjarðbúgvin | 1971-1975 |
| Fríu Føroyar | 1983-1993 |
| Føroyatíðindi | 1915-juni 1931<br>1932-juni 1939<br>1943-1950<br>1952-1959 |
| Glaðustrok | 1968-1971<br>1973 |
| Losjutíðindi | 1982 |
| Norðlýsið | 1915-1920<br>1940-1944<br>1951-1964<br>1967- |
| Oyggjatíðindi | 1977- |
| Sosialurin | 1927- |
| Suðuroyar tíðindi | 1984-1987 |
| Tíðindablaðið | 1974-1975 |
| Tímin | 1943-1946 |
| Tingakrossur | 1901-1945<br>1950<br>1953-1954<br>1960-1990 |
| Vikutíðindi | 1982 |

## BÓKMENTAVIRÐISLØNIR

Í september vórðu handaðar bókmentavirðislønir M.A. Jacobsens og barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráð 1999 (1998).

M.A. Jacobsens virðisløn fyri yrkisbókmentir varð latin Dorete Bloch (J.P. Gregoriussen) og Martin Tórgarð (Frits Johannesen) fekk virðislønina fyri mentanaravrik.

Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráð varð latin Eli Smith (Lydiu Didriksen og Knúti Olsen).

Á almennari samkomu í Norðurlandahúsinum 22. nov. 1998 fekk Jóhan Hendrik Winther Poulsen handaða sømdargávu úr Grunni Kristjans á Brekkumørk.

Jens Pauli Heinesen fekk handaða mentanarvirðisløn landsins á almennari samkomu í Norðurlandahúsinum 11. oktober 1999.

## BÓKAÚTGÁVA

Í 1999 komu 121 (157)[2] bøkur út á føroyskum máli - 84 (96) upprunaverk og 37 (61) týðingar. Samlaða talið av føroyskum bókum, síðan tann fyrsta bókin kom út í 1822, er sostatt 3.882 bøkur.

Tær 121 bøkurnar høvdu tilsamans 20.587 (28.452) blaðsíður, og samlaði kostnaðurin fyri tær var kr. 15.907 (18.850).

Bókaútgávan kann bólkast soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Skaldsøgur | 7 | (7) | |
| Stuttsøgusøvn | 0 | (2) | |
| Yrkingasøvn | 8 | (7) | |
| Sjónleikir | 1 | (2) | |
| Barna- og ungdómsbøkur | 26 | (54) | |
| Skúla- og lærubøkur | 11 | (28) | 4 endurútg. |
| Yrkisbókmentir | 68 | (57) | 8 endurútg. |
| | 121 | (157) | 12 (16) endurútg. |

Umframt hesar bøkur vórðu eisini útgivnar:

40 (34) bøkur, skrivaðar av føroyingum á øðrum málum, skrivaðar um føroysk viðurskifti, ella sum onkursvegna viðvíkja Føroyum.

83 (101) bøkur, so sum árbøkur, jólabøkur, skemtirit, kort, álmannakkar, serprent, álit, próvritgerðir o.a.

3 (2) bøkur vórðu týddar úr føroyskum og útgivnar á øðrum málum.

[2] *tølini í ( ) eru samsvarandi tøl fyri 1998*

Bøkurnar eru:

1998 *Jógvan Isaksen: Brandstifteren*. - Kirsten Sørensen týddi til danskt.
*Tóroddur Poulsen: Standsninger*. - Tóroddur Poulsen týddi til danskt.

1999 *The Faroe Islands*. *Editor: Óla Jákup Rólantsson*.
*The Faroese national team / Jóannes Hansen & Finnur Helmsdal*. - Simon Marshall týddi til enskt.
*Jóanes Nielsen*: *Sting*. - Ebba Hentze týddi til danskt.

**Týðingar**

38,9% (41,9%) av føroysku bókaútgávuni í 1998 eru týðingar. Verður hugt eftir, úr hvørjum málum týðingarnar eru gjørdar, sær úrslitið soleiðis út:

| | | |
|---|---|---|
| 5,4% | (3,3%) | úr amerikonskum |
| 10,8% | (19,7%) | úr donskum |
| 37,9% | (37,7%) | úr enskum |
| 16,2% | (4,9%) | úr norskum |
| 18,9% | (29,5%) | úr svenskum |
| 2,7% | (3,3%) | úr týskum |
| 8,1% | (1,6%) | úr øðrum málum |

**Prentingin**

Av tølunum á talvu 1 (s. 35) sæst, at 49 av teimum 121 bókunum eru prentaðar uttanlands. Hetta svarar til 40,5% (33,1%) av bókunum.

Hyggja vit at samsvarandi tølum aftur til 1989 sæst, at talan er um eina veruliga broyting í prentviðurskiftunum, tí lutfalsliga nógv fleiri bøkur verða nú prentaðar í Føroyum.

Í prosentum sær myndin soleiðis út, hyggja vit at, hvussu nógv varð prentað uttanlands í hesum tíðarskeiði:

| | |
|---|---|
| 1989 | 83,1% |
| 1990 | 71,4% |
| 1991 | 69,7% |
| 1992 | 53,0% |
| 1993 | 42,3% |
| 1994 | 35,7% |
| 1995 | 40,6% |
| 1996 | 36,4% |
| 1997 | 38,0% |
| 1998 | 33,1% |
| 1999 | 40,5% |

## Útgevarar

Teir størstu bókaútgevararnir í 1999 vóru

| | |
|---|---|
| Bókadeild Føroya Lærarafelags | 30 |
| Føroya Skúlabókagrunnur | 13 |
| Føroya Landsstýri | 10 |
| Mentunargrunnur Studentafelagsins | 6 |
| Bókagarður | 5 |
| Fannir | 3 |
| Leirkerið | 3 |
| Stiðin | 3 |
| Fuglafjarðar Býráð | 2 |
| Føroyski Bíbliugrunnurin | 2 |
| Landsverkfrøðingurin | 2 |
| Sprotin | 2 |

## Bløð og tíðarrit

Í 1999 komu út  44 (44) bløð og tíðarrit.

## Avísir

Í 1999 komu út  6 (4) avísir.

*Dagblaðið, Dimmalætting, FF-blaðið, Norðlýsið, Oyggjatíðindi og Tíðindablaðið Sosialurin* komu regluliga út í árinum.

## Fløgur og bond

Í 1999 komu út 50 fløgur og bond.

# Norðurlendska bókasavnsvikan 1998

Norðurlendska bókasavnsvikan var hildin fyrstu ferð 1997, undir heitinum “Í skýmingini - Orðið í Norðri”. Í 1998 var Norðurlendska bókasavnsvikan hildin á øðrum sinni, nú undir heitinum “Í skýmingini - Skemtan í Norðurlondum”.

Henda felags norðurlendska bókasavnsvikan er skipað sum samstarv millum PR-felagið fyri norðurlendsk bókasøvn og norrønu feløgini. Verkætlanin verður stuðlað av Norðurlendska Ráðharraráðnum og teimum norðurlendsku bókasavnsfeløgunum.

Norðurlandaráðið vil við hesari árligu bókasavnsviku fremja áhugan fyri norðurlendskum bókmentum.

Tiltakið inniheldur eitt felags tiltak fyri øll norðurlond og tiltøk sum eru á teimum ymisku lokalu bókasøvnunum.

Felagstiltakið umfatar upplestur á bókasøvnum. Hesin upplestur er samstundis í øllum Norðurlondum. Meðan lisið verður, verða teldur og ljós sløkt, kertuljós verða tendrað, og lisið verður í skýming, harav navnið. Í 1998 var lisið upp í uml. 2000 bókasøvnum samstundis, úr Grønlandi í vesturi til Finnlands í eystri og Danmark í suðuri.

Í Føroyum vóru tvey bókasøvn við í hesum tiltaki. Føroya Landsbókasavn og Fuglafjarðar bókasavn.

Á Føroya Landsbókasavni var ein framsýning við skemtitekningum hjá Óla P. Talan var bæði um eina afturlítandi framsýning og eina framskygda úrlating!! Framsýningin hjá Óla P. stóð frammi alla vikuna.

Síðan var lisið úr skaldsøguni Ormi Reyða eftir Frans G. Bengtsson í týðing Bjarna Niclasen. Lisið var úr 9. kapitli, sum kallast “Hvussu jól vóru drukkin hjá Haraldi kongi Blátonn”. Hetta kapitlið ber orð fyri at vera serstakliga skemtiligt. Í hesum parti sæst, at hugur norðbúgva var vertskapur heldur enn bardagi, og parturin lýsir skemtiliga tann norðurlendska leikin til sátt og semju og ikki at gloyma norðurlendskan matsið. Upplesari var Jógvan E. Ósá.

Eftir upplesturin, meðan enn var sløkt fyri teldum og útvarpi, hugleiddi Eyðun Andreassen um skemt í 5½ minutt.

Til upplesturin komu umleið 50 fólk, og okkara varhugi var, at fólk vóru vælnøgd við tiltakið.

Í Fuglafirði var Norðurlendska bókasavnsvikan eisini hildin. Har byrjaði Petur Martin Petersen við at halda ein fyrilestur um Frans G. Bengtsson. Síðan las Frits Johannesen úr Ormi Reyða. Áðrenn og aftaná upplesturin sang eitt barnakór við 12 børnum norðurlendskar sangir. Teir 35 áhoyrararnir á bókasavninum í Fuglafirði føldu seg settar aftur í víkingaøldina, tá 100 kertuljós vórðu tendrað og upplesturin byrjaði. Sjálvt um 9. kap. er langt so føldist tíðin ikki drúgv.

Spell var, at ikki fleiri bókasøvn vóru við í hesum tiltaki, men Norðurlendska bókasavnsvikan er komin fyri at vera, so vónandi vera fleiri bókasøvn við næstu ferð.

Framtíðin

Á fundi í Stockholm og Södertälje tann 16.-17. sept. 1998 við PR-felagið fyri norðurlendsk bókasøvn og norrønu feløgini fingu Grønland, Føroyar og tey baltisku londini kunning um Norðurlendsku bókasavnsvikuna. Semja var um at halda fast við "Í skýmingini" og at eitt evni (Orðið í Norðri - Skemtan í Norðurlondum) verður fyri vikuna. Men síðan var semja um, at broytingar skulu henda. Arbeitt verður við, at rithøvundar í uppskoti til bókmentavirðislønina hjá Norðurlandaráðnum, skulu kunngerast í bókasavnsvikuni í framtíðini. Eisini verður arbeitt við at fáa Norðurlandaráðið til at gjalda fyri pr-tilfar, plakatir av rithøvundunum osfr.

Í skrivandi løtu veit eg ikki, hvat evnið verður til næstu Norðurlendsku bókasavnsviku, men tað verður avgjørt í vár. Arbeitt hevur verið við nøkrum evnum, m.a. børnum: Tá verður felags upplesturin ikki um kvøldið men um morgunin á øllum skúlum í Norðurlondum.

Eitt annað evni, ið eisini varð umrøtt, var Kalevala. Tað er so, at 1999 í Finnlandi er Kalevala-ár.

Birni Durhuus

# Ferðafrágreiðing frá kunningarferð til Noregs og Svøríkis 1998

Føroyskt bókasavnsumhvørvi er í síni heild sera lítið, og uppaftur minni er fakliga umhvørvið innan granskingar- og tjóðbókasavnsstarvið. Eisini hevur fakliga sambandið við útheimin verið sera avmarkað, tá tað snýr seg um tjóðbókasavnsstarv. Tá NORDINFO lýsti við stuðli til uppihald á bókasavni í øðrum norðurlandi, helt eg hetta vera eitt kærkomið høvi at kunna seg við hvørjar uppgávur onnur norðurlendsk tjóðbókasøvn hava. Her hugsaði eg serliga um hvussu tey umsita avhendingarlógina og hvussu tjóðbókasøvnini verða skrásett og varðveitt, og í hvønn mun hesi søvn eru atkomulig fyri almenningin. Eg vónaði at fáa íblástur og nýggj hugskot um hvussu vit kunnu varðveita okkara søvn fyri eftirtíðina, og hvussu vit kunnu menna tær tjóðbókaligu uppgávurnar á Føroya Landsbóksavni.

Løgtingslóg um landsbókasavn m.v. frá 1952 áleggur Føroya Landsbókasavni at røkja skylduna sum tjóðbókasavn. Sambært lógini skal landsbókasavnið eisini virka sum meginbókasavn fyri Føroyar, umframt at tað skal hava eitt savn av vísindaligum tilfari. Eins og Føroya Landsbókasavn hevur Universitetsbiblioteket i Oslo eisini havt fleiri uppgávur, tí umframt at vera universitetsbókasavn fyri universitetið í Oslo, hevur tað eisini verið norskt tjóðbókasavn. Mítt fremsta ynski var tí at vitja UB Oslo fyri at bera stovnin og virksemi hansara saman við Føroya Landsbókasavn.

Umsóknin varð gingin á møti og uppihald mítt var býtt ímillum Oslo og Mo i Rana. Eisini fekk eg høvi at vitja Kungliga Biblioteket í Stockholmi.

Í 1989 fekk Noreg nýggja avhendingarlóg. Í hesum sambandi var ein nýggjur stovnur, ið burturav skuldi røkja tjóðbókasavnsuppgávurnar, settur á stovn. Nýggja tjóðbókasavnið fekk navnið Nasjonalbiblioteket og hevur tvær deildir; Nasjonalbiblioteket, avd. Mo, heldur til í Norður-Noregi, og Nasjonalbiblioteket, avd. Oslo, heldur til í gamla Universitetsbiblioteket á Drammensveien í Oslo.

At Noreg valdi at býta virkisøkið hjá tjóðbókasavninum hevði tvinnanda orsøkir. Í fyrsta lagi tí at nýggja avhendingarlógin, ið er sera framsøkin, kravdi ómetaliga nógv pláss. Plásstrot og vantandi útbyggingarmøguleikar í Oslo gjørdu, at ikki bar til at hýsa øllum tí økta virkseminum hjá Nasjonalbiblioteket. Í øðrum lagi var orsøkin ein avleiðing av norskari bygdamenning. Statsstuðlaði jarnídnaðurin í lokalsamfelagnum Mo i Rana varð í tíðarinnar anda noyddur at minka um ólønandi virksemi sítt í áttatiárunum. Hetta førdi stórt arbeiðsloysi við sær og varð tí avgjørt at byggja nýtt tjóðbókasavn á staðnum og at umskúla tøku arbeiðsmegina til hetta arbeiði.

Í Noregi er avhendingarskyldan tvíbýtt, t.v.s. at útgevari og framleiðari skulu avhenda ávíkavíst 2 og 5 eintøk. Nasjonalbiblioteket, avd. Rana, sum eisini er depotbókasavn fyri norskar bókmentir, fær tvey eintøk. Annað eintakið er til fjarlán, og hitt verður goymt eftir "numerus currens" inni í fjallagoymslu, ið er bygd til endamálið. Goymslueintakið verður ikki lænt út, men er ætlað at verða varðveitt í "allar ævir" í sínum upprunalíki. Nasjonalbiblioteket, avd. Oslo, fær triðja eintakið, ið bert kann nýtast sum lesistovulán. Hetta eintakið verður eisini goymt í sínum upprunalíki og sett upp eftir "numerus currens". Hini fimm eintøkini verða send til hvør sítt universitetsbókasavn.

Øll bókasøvnini eru knýtt upp í felags teldugrunn, ið eitur BIBSYS. Nasjonalbiblioteket, avd. Rana, ið tekur ímóti avhendingini, ger eina fyribils bókmentafrøðiliga skráseting og skrásetur í egnum avhendingarmoduli í BIBSYS at tey hava tikið ímóti teirri einstøku skylduni. Síðani fer ritið til Katalogkontoret, har tað fær eina meiri nágreiniliga bókmentafrøðiliga skráseting. Við Nasjonalbiblioteket, avd. Oslo, verður ritið flokkað, umframt at skrásetingin verður fullførd, so at hon svarar til eina bókasavnfrøðiliga skráseting á tí støði ein almenn tjóðbókaskrá krevur. Skrásetingin fer øll fram í BIBSYS, og meðan hon fer fram, verður posturin læstur, soleiðis at eingin annar fær atgongd til hansara. Tá posturin, ið nú er á triðja stigi innan skráseting, er liðugur, verður hann kopieraður til Norsk bokfortegnelse, ið liggur í teldugrunninum NORBOK. Tá hetta er gjørt, fer posturin í BIBSYS aftur til sítt BIBSYS-snið.

Í Svøríki er tað Kungliga Biblioteket, ið røkir uppgávurnar sum svenskt tjóðbókasavn. Skrásetingin av bókum fer fram í teldugrunninum LIBRIS, ið er felags teldugrunnur fyri svensk bókasøvn. Eins og í Noregi er skrásetingin grundað á avhendingareintakið, og verður tað við móttøkuna á “Forvärvskontoret” fyribilsskrásett, fyri síðani at fáa eina nágreiniligari bókmentafrøðiliga skráseting og flokking. Meðan skrásetingin fer fram, verður posturin læstur og verður ikki givin leysur aftur, fyrr enn hann er kopieraður yvir í Svensk bokförteckning. Ritið fer síðani til innbindingar og hareftir fer tað á goymslu undir jørð. Uppsetingin er eftir “numerus currens”.

Í LIBRIS er einki modul at skráseta avhending av teimum einstøku prentlutunum. Kungliga Biblioteket hevur tó ein teldugrunn yvir avhendarar, har eftirlit er við um teir lata regluliga. Ætlanin er at fáa eitt rættiligt avhendingarmodul, ið skal liggja í LIBRIS.

Sum skilst, hava tey ymisku bókasøvnini ikki sama politikk, tá tað snýr seg um at varðveita prentlutirnar. Nasjonalbiblioteket í Noregi bindur einki inn, lutvíst fyri at spara, men mest við tí í hyggju, at ritið skal varðveita sín uppruna. Kungliga Biblioteket bindur sínar bøkur inn, men í eina lætta innbinding. Eftir eitt tíggjuára skeið inni í fjallagoymsluni í Noregi og órørt av mannahond er nú greitt, at sumt av tilfarinum hevur fingið løst, tí at tað hevur verið ov illa vart. Spurningurin er, hvat er týdningarmest at varðveita – útstjóndina ella innihaldið. Føroya Landsbókasavn hevur lagt dent á tað seinra og bindur tí mest sum alt inn í heilbind.

Í smáprentsavnininum SA (Systematisk avdeling) á Nasjonalbiblioteket finst tilfar, ið mest snýr seg um prentlutir frá fyritøkum og stovnum. Hetta savn fær ikki nakra bókmentafrøðiliga skráseting, men verður skipað eftir Dewey-flokkingini og síðani eftir navni á teirri fyritøku ella stovni, ið hevur latið ritið prentað. Smáprent verður avhent í tveimum eintøkum, har annað eintakið verður goymslueintak í Mo, og hitt verður brúkt til lesitovulán í Oslo. Deildin í Rana tekur ímóti avhendingini, skrásetur tilfarið og sendir annað eintakið til Oslo, sum skrásetur sítt eintak í felags SA-teldugrunni og kanska leggur upplýsingar aftrat. Savnið er skrásett í egnum grunni, ið ætlanin er at leggja út á netið.

Í Kungliga Biblioteket eitur smáprentsavnið “Okatalogiserat tryck” ella OKAT. Prentlutirnir eru flokkaðir eftir SAB, ið er flokkingarskipanin fyri svensk bókasøvn, og síðani undir fyritøkuni ella stovninum. Savnið er skrásett í egnum dátugrunni, ið bert Kungliga Biblioteket hevur atgeingi til.

Smáprentsavnið á Føroya Landsbókasavni er bygt upp á líknandi hátt eins og í Noregi og Svøríki. Prentlutirnir verða flokkaðir eftir DK5 skipanini og síðani undir navni á fyritøkuni ella stovninum. Í einstøkum førum eru prentlutirnir savnaðir beinleiðis undir floksmerki, t.d. konsertskráir. Í skrásetingini verða eisini evnisorð løgd inn, umframt upplýsingar um innihaldið á pakkanum.

Á Føroya Landsbóksavni verða ávísir prentlutir, sum í prinsippinum hoyra til smáprent-savnið, skrásettir bókmentafrøðiliga í teldugrunnin SVABO.

Føroya Landsbókasavni er eftir lógini álagt at savna útlendskar bókmentir um Føroyar og føroyskar bókmentir í umseting. Roynt verður at savna alt tað "Feroica", ið vit fáa kunnleika um, tað veri seg bøkur, greinir og partar av bókum, umframt AV-tilfar. Tilfarið verður í summum førum skrásett í Føroyskum bókalista ella í SVABO. Snýr tað seg um tíðarritsgreinir ella partar av bókum, verður hetta skrásett í MOHR.

Norwegica savnið í Noregi savnar norskar umsetingar í útlondum og útlendskar bókmentir um Noreg og fevnir um bøkur, partar av bókum og tematíðarrit. Savnið verður skrásett í partgrunni (NOREX) í teldugrunninum NORBOK. Tá tað snýr seg um partar av bókum, verða hesir skrásettir í egnum innanhýsisgrunni.

Sviar savna á tilsvarandi hátt sítt "Suecana extranea". Fyrr var henda skráseting givin út í bók, men verður nú bert skrásett í LIBRIS. Partar av bókum, ið eru í Suecana extranea, verða eisini skrásettir í sjálvum LIBRIS.

Í Svøríki vitjaði eg umframt Forvärvskontoret eisini aðrar deildir m.a. Periodika kontoret, ið skrásetur tíðarrit, og ISSN-kontoret, ið hevur ábyrgdina av at tilluta svenskum tíðarritum altjóða tíðarritsnummur.

Í Oslo vitjaði eg umframt "Norske avdeling" eisini aðrar deildir, m.a. handritasavnið. Hetta var skrásett í egnum grunni, ið bókasavnið sjálvt hevði gjørt til endamálið. Tíðin var tíverri ov stutt til at kunna meg hvussu teldugrunnurin virkaði.

Eisini var møguleiki at vitja bókabindara og konservator. Hesin seinni greiddi frá hvussu serliga skjøl, kort og plakatir eiga at handfarast og konserverast, og hvønn leiklut konservator hevur í tí fyribyrgjandi arbeiðinum.

Fjernlån og Innkjøpskontoret fekk eg eitt stutt innlit í hvussu hetta arbeiði var skipað. Alt virksemi hjá hesum deildum fer eisini fram í BIBSYS. Hetta hevur tann fyrimun, at ein til eina og hvørja tíð fær eitt heildaryvirlit yvir "status" hjá hvørjari einstakari bók ella skjali.

Í Noregi fevnir avhendingarlógin ikki bert um prentað tilfar. Ljóðupptøkur, filmar, telduskjøl og annað AV-tilfar skulu avhendast í 2 eintøkum og útvarps- og sjónvarpssendingar í einum eintaki. Nasjonalbiblioteket avd. Rana tekur ímóti og goymir hetta tilfar. Skrásetingin fer fram í australskari telduskrá MAVIS, ið umframt at skráseta tilfarið eisini kann goyma tað í digitaliseraðum formi.

I Mo vitjaði eg eisini Medielaboratoriet, ið er sera framkomið og einasta av sínum slag í Noregi. Deildin fæst mest við at mikrofilma norskar avísir, men tekur eisni á seg uttanhýsis uppgávur móti gjaldi.

At vitja so nógvar deildir uppá lutvíst stutta tíð gevur ikki møguleikar at fordjúpa seg í einstøku arbeiðshættirnar, men gevur heldur eina hóming av hvørjar uppgávur hesi bókasøvn hava og hvussu tey skipa arbeiðið. M.a. verða fleiri arbeiðsuppgávur loystar í forminum sum verkætlanir. Arbeiðið á stovninum gerst kanska meiri smidligt og málrættað við tað at ein hevur eina orðaða verkætlan og ikki minst eftirmeting av arbeiðinum.

Sjálvt um tíðin ikki røkk til at taka lut í dagliga arbeiðinum, hevur tað tó verið ein lærurík ferð. Vælvildin hevur verið sera stór alla staðni. Ikki minst hevur persónliga sambandið við fólk í einum fakumhvørvi, ið okkum tørvar so mikið at dúva uppá, havt stóran týdning.

Marjun Patursson



**Ulf Zachariasen**
**bókavørður mag.art.**
**f. 22/11-1925 d. 8/8-1998**

Seinasta sunnudag - tá ið fleiri okkara sótu uppi í Norðurlandahúsinum og heiðraðu Jóhan Hendrik og lurtaðu eftir frálíka fyrilestrinum hjá Jørgen Rischel - tann dagin vóru eisini 73 ár liðin, síðan Ulf varð føddur norðuri í Klaksvík sum 5. barn av 6 hjá Jógvani Zachariasen, seinni amtslækna, og konuni Gudrun Thorup. Ulf, varð hann doyptur, uppkallaður eftir einum av floksmonnunum, Hálvdani Úlfsson.

Ulf tók realprógv í Havn í l940 og nýmálsligt studentsprógv í 1943 eisini í Havn. Tá ið kríggið var av í 1945 fór hann til Keypmannahavnar at lesa. Mamma hansara hevur í endurminningum sínum m.a. skrivað soleiðis: "Jeg overlod altså Ulf nu til at leve "studentens lyckliga dag" i København".

Í Keypmannahavn dvaldi Ulf so í um 20 ár og í l964 skrivaði hann magistararitgerð sína við Universitetið í Keypmannahavn, hana kallaði hann *Sproget í J.H.Schrøters oversættelse af Færeyinga saga (1832), specialeopgave i magisterkonferens i nordisk filologi*.

1. juni l966 varð Ulf settur sum vísindaligur bókavørður við Landsbókasavnið og í hesum starvi sat hann til 1. mars l992, tá ið hann legði frá sær vegna heilsubrek. Árið 1985-1986 hevði hann tó farloyvi úr starvinum, meðan hann røkti starvið sum lektari í føroyskum við Universitetið í Keypmannahavn.

Í óprentaðu endurminningum sínum *Jeg har aldrig kedet mig. Livserindringer* (1965), skrivar mamman, Gudrun Zachariasen, at Ulf longu sum smádrongur líktist burturúr. "Ulf legede også på trøen (Skálatrøð). Han var nok den mindste soldat i Gullachs hær, men iøvrigt var han ikki kriger af natur - mere fredelige sysler havde hans interesser" (s. 164). So nevnir hon, at hann savnaði alt møguligt: frímerkir, karamellpappír, svávuldósir - ja eina tíð savnaði hann jarðarferðarsálmar. Hann las nógv. Í 1936, tá er hann 11-12 ár, verða tvey av eldri systkjum hansara (Torbjørn og Ingeborg) útskrivað sum studentar frá donskum studentaskúlum (Birkerød og Silkeborg), og í hesum sambandi fer Ulf við mammuni til Danmarkar. Mamman er heilt ovfarin av øllum tí, sum drongurin longu tá visti um tað, hann sá. "Hann hevði lisið so nógv, so hann kendi nógvar bygningar og listaverk aftur úr bókum og tíðarrritum," skrivar hon (s. 168).

At Ulf alla tíð hevur havt áhuga fyri tí filologiska er heilt greitt, tí longu sum heilt lítil smádrongur gjørdi hann vart við seg á heimafrontinum. Yngsta systir hansara eitur Gunnver, kallað *lítla systir*, men tað dugdi beiggin ikki at siga, so tað bleiv til *Dyssa*, og tað verður hon rópt enn í dag (s. 149).

Í rúgvu er tað kanska ikki so nógv, sum Ulf skrivaði. Men eg hugsi, at nógv av tí er slóðbrótandi á sínum øki, og her hugsi eg serliga um tær málfrøðiligu greinirnar, ið liggja eftir hann.

Hann skrivaði greinir í Fróðskaparrit, í útlendsk tíðarrit og í bøkur. Sama ár sum hann skrivaði magistararitgerð sína, í 1964, skrivaði hann eisini t.d. grein í Fróðskaparrit um *Jakob Jakobsen og ritgerðir hansara* (13. bók). Hann skrivaði eisini greinir

- um *ljóðyvirflyting í føroyskum*
- um *bendingarformar av kenniorðum og lýsingarorðum í hvørjumfalli varðveittir í Norðoyamáli*
- um *munin millum Suðuroyarmál og føroyskt annars í longdarfatanini av p, t, k, s + j, r og p, k + l*
- um *rótstovnar í føroyskum*
- og um *skiftið millum framgóma- og afturgómaframburð....*

Og einaferðina royndi hann at sannføra alheimin um, at Mykines átti at itið Svínoy og Svínoy Mykines, og hetta gjørdi hann vist so rammliga, at hann varð endurgivin uttanlands fyri hesa áskoðanina.

Ulf legði eisini bøkur til rættis, og hann hevur týtt til føroyskt og latið prentað smásøgur eftir kendar høvundar í grannalondunum, eitt nú eftir Hjalmar Söderberg, Halldór Laxness, Jonas Lie o.a.

Ulf arbeiddi ein stóran part av sínum lívi millum handbøkur og bókasavnsskráir. Sjalvur var hann bæði - ein tjúkk handbók og ein stór bókasavnsskrá. Hann hevði nógv tilfar liggjandi inni á sínum egna harddiski. Og í myndaligari talu kanst tú siga, at tá ið teldan av álvara fór at gera vart við seg, tá trýsti Ulf á ctrl-alt-delete-knøttin og fór til hús.

At enda vil eg siga nøkur heilt fá orð um Ulf sum samstarvsfelaga. Eg kom at kenna henda mannin fyrstu ferð í 1973, tá ið eg arbeiddi saman við honum í eitt ár á Landsbókasavninum, tá hevur hann verið 48 ár og eg 20. Eg má siga, at longu tá helt eg hann vera ein eldri mann, og eg haldi ikki, at hann broyttist so nógv í útliti øll tey árini vit kendust eftir tað.

Ulf var ikki tað slagið av menniskjum, sum broyttist bara tí at mótin broyttist. Hann helt fast við sítt: Hann át hjá Ellingsgaard, hann súkklaði, tá ið aðrir settust upp í bilar, hann bant sær sloyfu, tá ið aðrir bundu sær slips. Hann gekk í knickers, tá ið aðrir fóru í floyalsbuksur, og hann koyrdi í sínum LADA, sjálvt um aðrir fingu sær ein nýggjan Audi ella ein nýggjan Ford. Tá ið allir føroyingar fingu sær sjónvarp - í áttati árunum - segði hann, at hann ætlaði sær í grøvina sum tann síðsti føroyingurin, ið ikki hevði átt sjónvarp. Hann visti ótrúliga nógv. Hann mintist ómetaliga væl. Hann reypaði ikki. Í veruleikanum haldi eg, at hann var ein lítillátin maður, sum ikki órógvaði nakran og sum ikki legði so nógv í at verða órógvaður. Hann hevði humor og sín egna stíl. Ein dagin, eftir at eg var settur sum landsbókavørður, minnist eg, at hann steðgaði á, og við sínari butterfly væl knýttari undir øsini segði hann á sín sermerkta hátt: *landsbókavørður, í cowboybuksum*!??? Og so risti hann við høvdinum.

Tá ið Ulf gjørdist sjúkur og mátti leggja arbeiðið frá sær, var hann bara 66 ár. Ferðin, sum hann altíð hevði ætlað sær at fara kring allan knøttin, tá ið hann kom til pensjónsaldurin, varð av ongum, men um sjónvarpið ferðaðist hann víða úr stovu síni í Álvastíggi tey síðstu árini. - Ja, hann fekk sær sjónvarp til síðst. - Men eg hugsi, at hann longu tá var komin í søgubøkurnar. Ulf var nevniliga eitt av teimum fyrstu børnunum, sum gekk í barnagarð hjá Nonnunum í Havn . - Og nú eg nevni børn, so vil eg leggja aftrat, at hann var barngóður sum fáur, tað hava vit øll merkt, sum onkuntíð hava havt børn við, har Ulf var til staðar. Eg minnist serliga einaferð vit fóru eina starvsfókaútferð norður til Gjáar. Nógv smábørn vóru við í ferðalagnum. Allan dagin var hann mittpunktið hjá teimum - og honum dámdi tað, tað sást langan veg. - Eg hugsi, at hansara lívsstílur var soleiðis, at tað vóru ikki so nógvir dagar í hansara lívi, har hann var mittpunktið. Men hesin dagurin norðuri í Jógvansstovu við Gjógv var ein teirra.

Ulf var ein trúfastur samstarvsfelagi, og tá ið á stóð var hann eisini ein hollur vinur.

Friður verið við minninum um Ulf Zachariasen.

Martin Næs

Mikukvøldið 19. mai 1999 skipaði Landsbókasavnið fyri fundi undir heitinum: **Mentan og fullveldi**.

Endamálið við fundinum var at leggja upp til kjak um fullveldi og mentan. Trý fólk løgdu fyri: Signar á Brúnni, landsstýrismaður í skúla- og mentamálum, Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, og Gunnar Hoydal, rithøvundur.

Fundurin varð hildin í fyrilestrasalinum og 70 fólk møttu.

Her verða røðurnar hjá Gunnari Hoydal og Maluni Marnersdóttur prentaðar.

## Ein pottur av hvørjari tunnu

Tá ið eg las innbjóðingina til hetta kvøldið, hugsaði eg: Fullveldi og mentan, er tað ikki hvørt sítt? Eiga vit ikki at hava skeggið fyri seg og snorið fyri seg, sum danir siga? Skal ikki her siga, at mentanin er sum snorið, ið legst uttaná og verður turkað burtur so av og á við handarbakinum ella einum illum lummaklúti, sjálvt um tað viðhvørt kann tað tykjast at vera nakað tann vegin.

Men áðrenn vit halda fram, má eg viðganga eina synd: Eri ein av teimum, sum í greinum ymsastaðni og í fyrilestrum úti um lond havi roynt at borið føroyskari mentan og list mong góð orð og undrast á, at eitt so lítið og avbyrgt land kann hava skapað so nógv á so lutfalsliga høgum støði. Í fólkatali sum ein miðalstórur keypsstaður í norðurlondum er okkara land, men hvør keypstaður hevur so nógv skald, so nógv myndlistafólk og tónaskøld, ikki um at tala virknar tónleikarar næstan í hvørjum kjallara, úthúsi og bilskúri? Hví er tað so, havi eg spurt áhoyrararnar ella lesararnar? Og eg havi svarað mær sjálvum, at í Føroyum er, ímóti øllum líkindum, ein kensla og ein hjartasláttur, sum vinnur á øllum, sjálvt tí marknaði, sum nú sigst at ráða fyri øllum. Tí at alt er enn so nýtt, so óroynt og skal sigast ella gerast fyrstu ferð.

Einki er sum fyrstu ferð, tað vita vit. Men eg havi nú verið uppi í mentanararbeiði so mikið leingi, at tann fyrsta ferðin fer at vera nakað litfarin og hýggjuskotin, sum frá líður. Eg síggi, at tað hjálpir ikki longur við orðum at geva eina vakra mynd av huga og dirvi og áræði, tá ið einki aftursvar hoyrist. Jú, eitt slag av aftursvari er: Útlendingar, sum hoyra tað, klappa og nikka, tað er ikki eiti á og ótrúligt og heilt fantastiskt. Eru teir smáir, so eru teir knáir! Og okkara umboð í salinum, kanska er tað ein løgmaður ella ein landstýrismaður ella ein borgarstjóri, dusa sær og sóla sær og halda væl til standa. Tað fær neyvan verið betur við okkara mentan enn tað sama.

Men hvussu við teimum, sum hava gjørt landinum æru og givið okkum virðing millum onnur? Nei, nei, tey munu hava havt ein stuttleika, meðan tey málaðu ella sungu ella spældu, tað mátti verið nóg mikið við tí, annars høvdu tey ikki gjørt tað. So hesin greinskrivarin og fyrilestrarhaldarin, sum vil gera landinum væl og vera góður umboðsmaður fyri sínar landsmenn, er einki uttan ein svíkjari móti sínum egnu. Hann rurar umsitarar og almenning í dreymablund og ger einki gagn hjá teimum, sum gera alt arbeiðið og skapa verkini. Tað, sum hann átti at gjørt, var at sagt, sum er: At onganstaðni um okkara leiðir er so óliviligt hjá skapandi fólki, sum í Føroyum. Vit síggja tað beinleiðis á nøvnum sum hesum: Annika Johannessen, Hans Pauli Olsen, Sunleif Rasmussen, Tóroddur Poulsen.. Fleiri onnur eru, fólk, sum hava skapað sær virðing aðrastaðni. Vit gleðast um tey, vit eru errin um tey, at teimum gongst so væl, og vit rokna tey uttan nakað til føroysku listina, meðan vit lata onnur gjalda tað, ið tað kostar at geva teimum arbeiðsumstøður.

List og mentan má einki kosta. Hetta hevur verið tann ongantíð skrivaði, men veruligi mentunarpolitikkurin í Føroyum, heilt síðani heimastýrið varð sett á stovn. Mentanin var fyrsta málsøkið, sum varð yvirtikið, og tað er lætt at skilja hví: Tað hevði stóran symbolskan týdning, og so var tað bíligt at umsita, eitt frálíkt mál bæði fyri sjálvstýrismenn og sambandsmenn. Fólk kundu syngja og kvøða og skriva yrkingar, tað kostaði einki. Skúlin, sum eisini var eitt tjóðskaparligt hjartamál, tað var verri við honum, tí har vóru allar læraralønirnar. So tær sluppu danir at gjalda, og teir gjalda tær enn við sínum høvdi á blokkinum, sjálvt um kanska einki er so týðandi fyri alla mentan, sum at hava livandi, vitandi og áhugaðar lærarar í okkara skúlum.

Sjálvt tað, sum einki kostar tí almenna, tykist at hava tað verri í Føroyum enn nakra aðrastaðni. Lat meg nevna eitt dømi: Lógina um upphavsrætt. Galdandi lóg er donsk lóg frá 1961. Tað er ein lóg frá teirri tíðini, tá ið skrivað varð upp á stensilar í skrivstovum og skúlum og síðani vundið við hond í einum sprittduplikatori. Tey seinastu 15 árini hava listafólk staðiliga heitt á skiftandi landsstýri um at fáa eina dagføring í lag, so at teirra verk kunnu verða vard í nýggju framkomnu tøknini á sama hátt sum aðrastaðni. Undanfarna løgtingið samtykti umsíðir at seta nýggja lóg í gildi, men av tí at nakrar smávegis rættingar síðani hava verið niðri, er lógin ikki lýst enn, sjálvt um uppskotið til kongaliga fyriskipan hevur ligið hjá landsstýrinum síðani seinasta summar. Har er so nógv annað, sum trokar á, fáa vit at vita, men fyri teir føroysk rættindaeigarar snýr tað seg um fleiri hundrað túsund krónur árliga, peningur sum væl at merkja ikki fer frá tí almenna, men frá teimum, sum brúka verkini, til teirra, sum hava skapað tey.

Tað hevur verið soltið, og tað stendur framvegis illa til. Men vit hava sæð ymisk tekin hesa seinastu tíðina, og nú hoyrast nýggir tónar. Nú ljóðar sjálvt frá vinnulívinum, at vit í framtíðini skulu byggja landið upp á tað, sum er í høvdinum á okkum millum oyrini bæði. At tað er tað menniskjansliga tilfeingið, sum verður avgerandi fyri samfelagið, um tað skal blóma ella følna. Samstundis hoyra vit, til dømis úr Íslandi herfyri, at tað eru ikki arbeiðsplássini, sum fáa fólk at støðast í hesum landspartinum ella hasum. Tey vilja eisini trívast, tey vilja verða virkin í einum fjølbroyttum og avbjóðandi felagsskapi.

Tann livandi áhugin gevur arbeiðshug. Vit síggja hetta í politisku endurreisingini, sum nú fer fram. Hetta hava listafólk og mentafólk altíð vitað og hava arbeitt eftir tí. So kanska er teirra løta nú komin. Hvat vit so kalla ta komandi skipanina, sum um stutta tíð fer at avloysa heimastýrið, so fer størri dentur at verða lagdur á tær skapandi gávurnar, sum eru í okkum øllum. Valið stendur millum hesi bæði: Annaðhvørt mentan og menning ella avtofting. At taka við okkara møguleikum ella at avtaka okkum sjálv. Tað valið skuldi verið lætt, men fyri tað er ikki vist, at alt verður so deiligt.

Sum nú til dømis listin. Listin er tann eggjandi parturin av mentanini. Tann nýggja listin setur krøv og krevur tíð, har er alt tað undarliga, eisini tað óunniliga og tað styggjandi, tú kanst fáa ilt av listini. Eitt samfelag, sum hevur tikið fulla ábyrgd av sær sjálvum, fer tað eisini at kennast við ábyrgdina av tí, sum bara fá skilja, og sum nógv hava andstygd og ampa av? Og hvør skal velja burturúr? Tað verður hart, og tað fer at seta krøv til okkum sjálv at fara frá hugnamentanini, sum higartil hevur verið mest sum einsamøll (tú hevur fingið eitt oyra, so mást tú eisini fáa eitt), og til eina mentan, sum fer at krevja dygd fyrst og fremst. Dygd, sum oftani ikki sæst beinanvegin, men er ein vági, ein íløga í tað ókomna.

Eingin kann liva av mentan, hevur verið sagt so ofta her hjá okkum, eingin kann eta mentan. Men sannleikin er tann, at eingin vinna veksur so skjótt í verðini sum nettupp tað nýskapandi

arbeiðið, tað er har, teir stóru vinningarnir eru. Men tað má hava umstøður í fyrstani, og eisini her eru nýggir tónar, nú vit til dømis hoyra um vinnufremjandi íløgur í føroyskan tónleik. Sjálvt tey sum mest hugsa um mettuna eru farin at lurta. Vit áttu at havt ein listagrunn, ikki fyri tí vakra og tí hampiliga, men fyri tí sjáldsama og einastandandi, tí sum er okkara serligi streymur, øðrvísi enn hinir streymarnir. Hann kundi til dømis komið úr oljuni, um so var. Vit kundu gjørt tað til eina treyt fyri teir í oljudansunum, at av hvørjari tunnu sum kom upp úr undirgrundini, skuldi ein pottur farið til føroyska list og mentan. Bara tað vórðu tey virknu, sum skuldu staðið fyri tí og ikki tann fólkavaldi partapolitikkurin.

Hvat eru tey sonnu virðini, vit eiga? Hvat er tað, sum ger samfelagið livandi og ríkt? Tað er ikki húsið í brekkuni ella bilurin í túninum. Tað er ikki tað, sum stendur inni á bók, men tað er tað, sum er í huganum og í hjartanum. Tað er gleðin um tað, vit fáast við og tað, vit skapa í felag, tá ið tað eydnast  Tað er álit og umsorgan fyri tí smáa í tí stóra. Tann lurtandi og gevandi samrøðan, tann virðiliga ósemjan, alt hetta, sum er mentan og list. Tað, sum vit hava fingið frá øðrum og skulu bera øðrum í nýggjum skapi, tað er okkara størsta felagsskylda at fara væl um tað. Tað er ein spurningur um okkara æru og sjálvsvirðing, at kunna líta so væl á seg sjálvan, at vit kunnu vísa øðrum álit. Tað liggur til sanna mentan at gera okkum til heil menniskju, til skapandi miðdeplar heldur enn óvirknar móttakarar.

Hvar hava vit í seinastuni hoyrt okkurt, sum líkist hesum? Er hetta ikki tað, sum sigst at vera kjarnin í ti hugtakinum, sum stendur fremst á fundarevninum í kvøld? Eitt veit eg í øllum førum: At hugsjónir og list er eitt avgerandi og neyðugt samfelagsarbeiði. Uttan eina sterka og livandi mentan, eru Føroyar bara eitt staðarnavn á einum landkorti, ein nakin klettur langt burturi í ongum.

So fullveldi og mentan, kanska er tað ikki hvørt sítt.

Gunnar Hoydal

## Mentan og fullveldi

Uttan mun til um vit fáa fullveldi ella okkurt annað slag av sjálvstýri, mugu vit vera greið yvir hvørja leið vit skulu halda mentanarliga og undir tí eisini vísindaliga. Vit tráa eftir at varðveita livilíkindini her á klettunum, og tí mugu vit satsa upp á mentan og gransking.

Leikluturin hjá granskingini í mentanarligum høpi er umfatandi.

Eftir mínum tykki er mentanin í Føroyum liðug at skapa tann føroyska samleikan í tann mun tað ber til at siga, at samleiki er nakað ávíst og væl avmarkað, sum kann vera liðugt. Tí eitt sum eyðkennir samleika er, at hann broytist í heilum, lagar seg eftir umstøðunum og ávirkar sjálvur umstøðurnar. Eg meini, at tað er teirri mentanarligu tjóðarbyggingini fyri at takka, at tað ber til - aftur nú - at tala um fullveldi. Tað er henni fyri at takka at tað hesa ferð ber til at fara nágreiniliga til verka og kanna møguleikarnar fyri øðrvísi sjálvstýri enn tað vit nú hava.

Farið var undir at byggja tjóðskaparliga samleikan í hinari øldini. Tá ið studentarnir hittust á Garði í 1876 og sungu teir fyrstu fosturlandssangirnar, var støðið longu lagt. Tað tjóðarbyggjandi virksemið hjá yrkjandi studentunum, sum seinni gjørdust embætis- og vinnulívsmenn, mentakonur og -menn í Danmark og heima í Føroyum, hevur starvsfelagi mín Turið Sigurðardóttir lýst og viðgjørt á fyrimyndarligan hátt í magistararitgerð síni um “At fara burtur fyri at koma heim” og nýliga í fyrilestri á ráðstevnu um smátjóðir.

Meginparturin av fyrra helmingi av hesi øld gekk við at byggja upp eina føroyskt mælta mentan. Tey stovnaðu føroyingafeløg og ungmannafeløg, sum høvdu til endamáls at koma saman og at fáa orðaskifti í lag um land og mentan. Á føroyskum. Tey fóru á háskúla og lærdu at skriva føroyskt, og summi fóru at yrkja og skriva søgur. Á føroyskum. Tí málið ímyndar tjóðarbyggingina, og bókmentirnar hava ein týðandi leiklut í tjóðarfyrireikingini.

Í hesum tíðarskeiðinum vóru allar tær fyrstu bøkurnar skrivaðar: fyrsta sangbókin Føriskar vysur (1892; sum seinni gjørdist føroyska sangbókin burturar: Songbók Føroya Fólks), fyrsta yrkingasavnið Yrkingar eftir Janus Djurhuus(1914), fyrsta skaldsøgan Bábelstornið eftir Regin í Líð (1909) og fyrsta bókmentasøgan, Føroysk bókmentasøga eftir Chr. Matras (1935). Tá ið føroyskt loksins í 1938 gjørdist kravd lærugrein frá fyrsta flokki í barnaskúlanum vóru stavingar- og lesibøkurnar langtsíðani klárar. Kanna vit eftir, so er so at siga eingin rithøvundur, sum er farin í skúla í 1938 og seinni, sum yrkir ella skrivar á donskum. Eftir krígsárini er tað sjálvsagt at skriva skaldskap og yrkisbøkur á føroyskum.

Tað eru fleiri mátar at lýsa hugtakið mentan. Mentan eru allir vanar og siðir hjá fólki. Men mentan er eisini felags heiti fyri ein avmarkaðan part av virkseminum í samfelagum: mentan er list og vísindi. Mentan er: bókmentir, tónleikur, sjónleikur, dansur, myndlist og kunnleikin um listagreinirnar og um náttúru - t.e. vísindi. Tað er klassiskt at binda list og vísindi saman á henda hátt. Og føroyska søgan vísir tað: tá ið málsligi grundvøllurin undir tjóðarsamleikanum var fingin til vega, bar til at fara víðari: stovna ein lærdómsstovn sum setrið. Fróðskaparsetur Føroya er stovnað í 1965. Tey fyrstu 25 árini var setrið eitt akademi

Akademi var upprunaliga ein felagsskapur í Athen, sum Platon grundaði umleið 385 f.Kr. Orðið sipar til ta lundina uttan fyri Athen, har akademiið var. Í miðøldini tóku akademiini sær av evnum ella frøðigreinum, sum universitetini ikki kundu hýsa. Seinni vóru akademi samtak av arbeiðandi granskarum.

Universitetini komu í miðøld, tað elsta sigst vera tað í Salerno í Suðuritalia. "Universitet" kemur av latínska orðinum "universitas", sum merkir heild - og sum er avleitt av "universus", sum merkir altumfatandi. Eitt universitet er tískil ein heild, og henda heildin umfatar gransking og undirvísing, lærarar (magister) og næmingar (schola) á latíni eitur tað "universitas magistrorum et scholarium". Universitetini vóru rættiliga sjálvstøðugar heildir eins og restin av virkseminum í samfelagnum var skipað í feløg, løg, sum á donskum kallast "laug" á enskum "guild". Umframt snikkarafelagið, skómakarafelagið og kannustoypara-felagið var altso universitetið, lestrar- og granskingarfelagið. Strangar reglur vóru fyri hvør kundi gerast limur, og eingin annar mátti stoypa kannur uttan limirnir í kannustoypara-felagnum. Enn er einki annað fullkomiliga øðrvísi stýrislag funnið til henda eftirkomaran eftir miðaldarligu lestrarfeløgini.

Modernaða universitetið stavar úr Týsklandi, har Wilhelm von Humboldt (1767-1835) endurskipaði universitetið í Berlin í 1810. Høvuðshugsanin hjá Humboldt var, at universitet skulu vera pláss har friður er til kompromisleysa leitan eftir sannleika. Frí gransking og frí studiir eru høvuðsætlanin við menniskjuni. Wilhelm von Humboldt vildi vera við, at um vísindini eru avbyrgd frá samfelagnum í sjálvstýrandi stovnum, fær tann mentaða tjóðin fulla undirtøku frá borgarunum, tí at lyndi og skil teirra eru skapað gjøgnum vísindini. Hóast hesin hugsanarháttur í summum lutum er avoldaður, so er kortini mangt, sum hevur hildið sær. Rannsóknarfrælsi, at gransking og undirvísing eru eitt og at universitetini eru sjálvstýrandi eru sjónarmið, sum síðani hava verið fyrimyndir fyri universitetini í okkara parti av heiminum. Sjálvstýrið, sum á ein hátt avbyrgja universitetini frá samfelagnum, tryggjar hinvegin gransk-ingini móti mótarákum og løtuvinningarhugsan.

Umframt hesa fríu gransking er nú á døgum í flestøllum londum eisini privat gransking, t.e. endamálsgransking, sum hevur til endamáls at finna mátar at loysa praktiskar spurningar ella at finna upp á nýggjar vørur. Slíka endamálsgransking fíggja vinnuvirkini sjálv, men dúva samstundis upp á úrslit og arbeiðsmátar hjá fríu granskingini.

Í Føroyum er so at siga øll gransking alment fíggjað, og gransking í Føroyum er so at siga sy-nonymt við teir almennu stovnarnar Fróðskaparsetrið, Náttúrugripasavnið, Fornminnis-savnið, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Fiskirannsóknarstovuna. Í hinum Norðurlondum fara millum 3,59% og 1,54% av bruttotjóðarúrtøkuni til gransking og menning. Í Føroyum verða umleið 0,51% av bruttotjóðúrtøkuni brúkt til gransking[3]. Í hinum Norðurlondunum eigur tað almenna umleið ein triðing av útreiðslunum til gransking og tað privata restina. Í Føroyum eigur tað almenna so at siga allar útreiðslurnar. Aðrastaðni er gransking í dag ikki bara ein almenn uppgáva, vinnan fíggjar vanliga sjálv ta vinnugransking, sum hon vil hava framda.

Føroyar fingu fyrst eitt akademi, sum fór undir rannsóknir í frøðigreinum, sum universitetini í kongaríkinum ikki høvdu á skránni: tær føroysku frøðigreinirnar. Síðani gjørdist Fróðskapar-setrið Føroya universitet í 1987. Endamálið bæði við akademinum og við universitetinum er: at inna gransking og hægri undirvísing og breiða út kunnleikan um vísindalig háttaløg og úr-slit.

---

[3] *Tølini hevur Granskingarráðið fingið til vega, og tey eru at finna í útbúgvingarpolitikkálitinum Føroyskur førleiki, bd. 1, 1999, s. 81*

Eingin hevur ætlað, at føroyska universitetið skal umfata allar frøðigreinir. Til tess røkka menniskjaliga og fíggjarliga tilfeingið ivaleyst ikki. Men hugsanin er, at ávísar frøðigreinir eru týdningarmiklari enn aðrar at hava í Føroyum. Lutvíst av fíggjarligum og hugmyndafrøðiligum grundum, men eisini við atliti at tí sum er serstakt ella sermerkt.

Eingin ivi er um at føroyskt mál og føroyskar bókmentir, hava Føroyar eina serliga skyldu til at kanna og granska. Bæði fyri okkara egnu tilvitan, fyri at fáa so nógvar upplýsingar til vega um mál okkara sum gjørligt og á tann hátt stimbra máltilvitan og málkunnleika okkara. Men so sanniliga eisini tí at føroyskt hevur stóran altjóða áhuga sum tað fimta norðurlendska málið, tað av teimum, sum fæst fólk tosa, og sum hevur verið mest nær við at doyggja út. Harumframt er føroyskt eitt framúrskarandi evni í samanberandi málgransking, tí í mun til næstringarnar norskt og íslendskt gera heilt serlig viðurskifti seg galdandi í føroyskum.

Føroyska søgu og føroysk samfelagsviðurskifti hava vit eina serliga skyldu til at kanna sjálv, tí søgan og samfelagsumstøðurnar eru okkara, og vit mugu vita so nógv um tær sum gjørligt fyri at menna tær. Tað er út frá kunnleika um søguna og sosialu skipanina í samfelagnum vit eru før fyri at broyta samfelagið eftir okkara tykki. Samfelagsviðurskifti og náttúra okkara hava stóran altjóða áhuga av tí at økið er avmarkað og kann so at siga leggjast undir eina sjóneyku og berast saman við størri samfelags- og náttúruskipanir.

Somuleiðis er føroyska náttúran okkara, og vit hava ábyrgdina av at hon ikki spillist av ovurhugi, ovurnýtslu, ovurdálking osfr. Vit sum búgva í Føroyum eru tey sum hava áhuga fyri at kenna hana út í æsir: veðurlagið og streymurin í sjónum eru gerandisfyribrigdi við stórum vísindaligum møguleikum fyri at skapa satt tilvit um livikor okkara. Náttúruumstøðurnar eru fyritreytir fyri okkara dagliga lívi, og tær hava týdning fyri vinnuna: Hon kann neyvan góðtaka at náttúran verður ránýtt - náttúran má sleppa at endurskapa tað, sum vit taka úr henni. Náttúruvísindaligar rannsóknir eru tí sera neyðugar fyri at kunna siga, hvussu javnvágin verður hildin.

Á henda hátt hava vísindini, Fróðskaparsetrið og hinir granskingarstovnarnir, frá fyrstan tíð skapað tilvitsku hjá borgarunum um mál, mentan, søgu og náttúru. Granskingarstovnarnir hava við øðrum orðum ein samleikaskapandi leiklut - á sama hátt sum universitetini í londunum rundan um okkum.

Hatta var nakað um leiklutin hjá mentastovnunum, sum arbeiða við gransking.

Síðani eru tað uppgávurnar og umstøðurnar:

Gransking og undirvísing í føroyskum viðurskiftum eru møguleikar og uppgávur sum vísindaliga umhvørvið í Føroyum hevur. Og føroysk vísindi hava hesar skyldur og møguleikar uttan mun til um landið verður eitt fullveldi, sjálvstøðug tjóð ella um tær halda fram at vera ein sjálvstýrandi partur av Danmark.

Hinvegin hava vit langt síðani skapað ta ideologi - ta hugmyndafrøði - at vit eru egin, vit hava okkara egna mál, okkara egnu søgu og bókmentir og okkara serligu náttúruumstøður, sum seta dám á lív og gerandisdag okkara. Tað broytist ikki um stýrisskipanin broytist.

Spurningurin verður, á hvørjum økjum føroyska samfelagið vil, at vísindini skulu fáa fram vitan og kunnleika - við øðrum orðum: hvørja tilvitan vil tjóðin, at granskingin skal fáa til vega í samfelagnum? Ein annar spurningur verður, hvussu stóran part av granskingini vinnurnar vilja taka upp á seg.

Verða Føroyar eitt fullveldi, ein suverenur státur, ein sjálvstøðug tjóð so hava tær sjálvar og aleina ábyrgdina av hesi mentanarligu og vísindaligu menningini. Tjóðin má taka mentanina og vísindini upp á seg. Hon fær beinleiðis skyldu til at byggja mentanarliga virksemið út.

Skulu vit hugsa í framhaldi av Wilhelm von Humboldt verður ikki nóg mikið at halda mentanini, søguni og kunnleikan um samfelag og náttúru uppi. Tjóðin má hava sína egnu rættarskipan og tískil mugu rættarvísindaligar rannsóknir gerast fyri at fáa egna tilvitan um rættarviðurskifti. Tjóðin má hava eina sosiala skipan og tískil mugu sosialar, samfelagsfrøðiligar - rannsóknir til fyri at skapa tilvitan um sosial viðurskifti. Verða Føroyar sjálvstøðug tjóð mugu vit hava vinnu- og handilstilvit fyri at klára okkum. Hvør veit, kanska fáa vit fría ídnaðar- og handilsgransking, sum skal nøkta tørvin á kunnleika um hvussu føroysk vinnuviðurskifti virka, samstundis sum vinnurnar sjálvar stíla fyri at loysa granskingarspurningar í sambandi við matvøruframleiðslu, fiskiskap og skipan fyri flutningi og øðrum samskifti. O.s.fr. Neyðugt er, at mentanin umfatar tilvitan um øll lívsins og samfelagsins viðurskifti.

Og at enda umstøðurnar:

Lat meg bara siga, at Føroyar verða eitt fullveldi í hesum umfarinum. Tá fær setrið onnur tilverurættindi enn nú, tí tjóðskaparliga sjálvsmyndin verður sum sagt viðgjørd á setrinum. Núverandi deildirnar Føroyamálsdeildin, Náttúrvísindadeildin og Søgu- og samfelagsdeildin fara at vaksna við øktu krøvunum um gransking og útbúgving á hesum økjum. Og eg eri púra sannførd um, at eitt tað fyrsta sum verður stovnað um fullveldið gerst veruleiki er, ein deild fyri lógar- og fyrisitingarfrøði á setrinum.

Men uttan mun til um fullveldi verður veruleiki um stutta tíð, so fer serliga samfelagsfrøðilig gransking, oljuverkfrøði og kunningartøkniliga økið at vaksa. Eg ivist lítið í, at tað koma granskingardeplar, sum eru knýttir at setrinum, granskingardeplar sum m.a. arbeiða við menning, ídnaði- og handli. Harafturat koma ivaleyst fleiri við, sum vit ikki duga at ímynda okkum í dag.

Hetta krevur alt nógvan pening, ordiliga nógvan pening. Tí tað er ikki bara at krevja hetta og hatta námið sett á stovn, hesa og hasa granskingina setta í verk. Tað verður als ikki bara sum at siga tað at fáa skikkað fólk, tey skulu hava løn. Harafturat kann føroyska universitetið ikki halda fram at húsast í ymsum um- og forbygdum sethúsum og undirvísa uppi undir væðingini í tíðaróhóskandi bygningum. Føroyska universitetið má hava virðiligar og tíðarhóskandi karmar at virka í. Eg vóni, at um 20 ár tá ið eg fari frá fyri aldur, hevur setrið í eina tíð húsast í góðum og hóskiligum hølum í einum bygningi, sum er bygdur til savnaða setrið. Har eru góðar umstøður hjá studentum og lærarum at arbeiða og liva hvør sær og saman, har eru allir nútímans hentleikar beint við hondina: undirvísingar-, bólka- og arbeiðsrúm, teldutøkni, bóka- og skjalasøvn, matstovur og studentabústaðir. Har er alt tað, ið er neyðugt í einum virknum lestrar- og granskingarumhvørvi til ta tíð.

Samanumtikið haldi eg, at fyritreytirnar fyri at útbyggja og víðka vísindaliga partin av mentanini eru til staðar. Gróðrarbotnurin er fyrireikaður gjøgnum tað mentanarliga arbeiðið sum er gjørt upp gjøgnum hesa øldina. Mentanarstovnarnir hava longu førleika og tilvitan um leiklutir sínar. Tað er upp til politikarar at hava sjónir og at seta í verk tiltøk, sum leiða á mál. Granskingarstovnarnir vilja fegnir geva politikarunum hugskot, men tað er ein politisk avgerð, hvussu tær tjóðskaparligu vísindauppgávurnar skulu loysast.

Men uttan mun til um talan verður um fullveldi ella okkurt annað slag av sjálvstýri um skamma stund, so má støða takast til hesar spurningar í næstu framtíð. Tí verður tað ikki fullveldið, sum er úrslitið, so ger heilt vanlig gerandistrá eftir at varðveita livilíkindini her á klettunum, at vit mugu seta upp á mentan og gransking.

Malan Marnersdóttir

## BÓKASØVN

| | | |
|---|---|---|
| **Bókasavnið í Nes kommunu** | mánadag | kl. 16.00-18.00 |
| 650 Toftum | mikudag | kl. 19.00-21.00 |
| Tlf. 448872 | | |
| Solveig Debess | | |
| **Býarbókasavnið** | mánadag-fríggjadag | kl. 10.00-18.00 |
| Box 358 | leygardag | kl. 10.00-13.00 |
| 110 Tórshavn | | |
| Tlf. 313626/Fax 310371 | | |
| Anna Brimnes | | |
| **Fuglafjarðar bókasavn** | mánadag-fríggjadag | kl. 09.00-12.00 |
| 530 Fuglafirði | | kl. 13.00-17.00 |
| Tlf. 444745 | leygardag | kl. 10.00-12.00 |
| Petur Martin Petersen | | |
| **Glyvra bókasavn** | mánadag | kl. 19.00-20.00 |
| 625 Glyvrum | hósdag | kl. 19.00-21.00 |
| Tlf. 447331 | | |
| Hans Poulsen | | |
| **Hvalvíkar bókasavn** | mánadag og mikudag | kl. 19.00-20.30 |
| 430 Hvalvík | | |
| Tlf. 422028 | | |
| Jórun Egholm | | |
| **Klaksvíkar bókasavn** | mánadag-mikudag | kl. 13.00-19.00 |
| Box 45 | hósdag-fríggjadag | kl. 13.00-18.00 |
| 700 Klaksvík | leygardag | kl. 10.00-13.00 |
| Tlf. 455757/Fax 455747 | | |
| Annika Egholm | | |
| **Kollafjarðar bókasavn** | | |
| 410 Kollafirði | | |
| Tlf. 421091 | | |
| Terje Hammer/Petur Ove Petersen | | |
| **Leirvíkar bókasavn** | mánadag og hósdag | kl. 19.00-20.00 |
| 520 Leirvík | | |
| Tlf. 443202 | | |
| Edvin Joensen | | |
| **Sandavágs-Miðvágs bókasavn** | mánadag | kl. 19.30-21.00 |
| 360 Sandavági | | |
| Tlf. 332512/332507 | | |
| Heini F. Petersen | | |
| **Stranda bókasavn** | mánadag | kl. 18.00-20.00 |
| 490 Strondum | hósdag | kl. 19.00-21.00 |
| Tlf. 448707 | | |
| Ólavur Christiansen | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Sunda bókasavn** | | |
| 450 Oyrarbakka | | |
| Tlf. 422245 | | |
| Arnold Joensen | | |
| **Sørvágs bókasavn** | mikudag og hósdag | kl. 15.00-17.00 |
| 380 Sørvági | | |
| Turid Sørensen | | |
| **Tvøroyrar bókasavn** | mánadag og mikudag | kl. 17.00-20.00 |
| 800 Tvøroyri | | |
| Tlf. 371584 | | |
| Martin S. Eidesgaard | | |
| **Vágs bókasavn** | mánadag | kl. 18.00-20.00 |
| 900 Vági | týsdag, mikudag og | |
| Tlf. 373991 | hósdag | kl. 15.00-18.00 |
| Henrikka Joensen/Magnus Hansen | | |
| **Vestmanna bókasavn** | mánadag og hósdag | kl. 19.00-21.00 |
| 350 Vestmanna | | |
| Tlf. 424551 | | |
| Niels Brimnes/Gyðja Hjalmarsdóttir | | |
| **Føroya Landsbókasavn** | mánadag-mikudag | kl. 10.00-20.00 |
| Box 61 | hósdag-fríggjadag | kl. 10.00-17.00 |
| J.C. Svabos gøtu 16 | | |
| 110 Tórshavn | | |
| Tlf. 311626/Fax 318895 | | |

**Hvalbiar skúlabókasavn**
850 Hvalba
Tlf. 375083
Jákup Jensen

**Skúlabókasavnið**
Kvívíkar skúli
340 Kvívík
Tlf. 421291
Bjarni Heinesen

**Skúlabókasavnið**
Felagsskúlin á Oyrarbakka
450 Oyrarbakka
Tlf. 422084/422584/Fax 422156
Sólrún Rasmussen

**Bókasavnið**
Meginskúlin á Sandi
210 Sandi
Tlf. 361038
Betty Hansen

**Skúlabókasavn Argja skúla**
Box 2002
165 Argjum
Tlf. 314136
Regin av Steinum

**Skúlabókasavnið**
Eysturskúlin
Skúlagøtu
100 Tórshavn
Tlf. 314752
Katrin Rubeksen/Jóhanna Skýlindal

**Skúlabókasavnið**
Hoyvíkar skúli
Vegnum Langa
188 Hoyvík
Tlf. 315073
Hervør Jákupsson

**Skúlabókasavnið**
Kaldbaks skúli
180 Kaldbak
Tlf. 317845
Henning Tausen

**Skúlabókasavnið**
Kommunuskúlin
Tróndargøtu
100 Tórshavn
Tlf. 311947
Hansina Huusgaard

**Skúlabókasavnið**
Sankta Frans skúli
Varðagøtu 10
100 Tórshavn
Tlf. 312147
Poulina Slættanes

**Skúlabókasavnið**
Venjingarskúlin
Frælsinum 20
100 Tórshavn
Tlf. 313502
Anny M. Hansen

TALVA 1

**Føroysk bókaútgáva 1998**

| | *Fagurbókmentir* | | | | *Yrkisbókmentir* | | | *Skúla- og lærubøkur* | | | *Barna- og ungdómsbøkur* | | | *Tilsamans* | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | óbund-ið mál | bundið mál | síður | kr. | bøkur | síður | kr. | bøkur | síður | kr. | bøkur | síður | kr. | bøkur | síður | kr. |
| **Upprunaverk** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **Prentað í Føroyum** | 3 | 5 | 994 | 1057 | 40 | 9652 | 5897 | 23 | 1840 | 1315 | 8 | 345 | 293 | 79 | 12831 | 8562 |
| **Prentað uttanlands** | 2 | 1 | 644 | 593 | 12 | 7111 | 4107 | 1 | 128 | 170 | 1 | 113 | 126 | 17 | 7996 | 4996 |
| **Týðingar** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **Prentað í Føroyum** | 5 | 1 | 1121 | 1070 | 3 | 1614 | 474 | | | | 17 | 2818 | 1927 | 26 | 5553 | 3471 |
| **Prentað uttanlands** | 1 | | 100 | 100 | 2 | 288 | 654 | 4 | 333 | 250 | 28 | 1351 | 1817 | 35 | 2072 | 2821 |
| **Bøkur tils. 1998** | **11** | **7** | | | **57** | | | **28** | | | **54** | | | **157** | | |
| **Síður tils. 1998** | | | **2859** | | | **18665** | | | **2301** | | | **4627** | | | **28452** | |
| **Krónur tils. 1998** | | | | **2820** | | | **11132** | | | **1735** | | | **4163** | | | **19850** |
| **Bøkur tils. 1997** | 10 | 5 | | | 47 | | | 22 | | | 45 | | | 129 | | |
| **Bøkur tils. 1996** | 13 | 3 | | | 51 | | | 23 | | | 50 | | | 140 | | |
| **Bøkur tils. 1995** | 9 | 3 | | | 62 | | | 28 | | | 53 | | | 155 | | |

TALVA 2

**Føroysk bókaútgáva 1998** - býtt eftir máli

| | *Fagurbókmentir* | | *Yrkis-bókmentir* | *Skúla- og lærubøkur* | *Barna-bøkur* | *Til-samans* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | óbundið mál | bundið mál | | | | |
| **Týðingar til føroyskt** | | | | | | |
| **úr amerikonskum** | | | | | 2 | **2** |
| **úr donskum** | 1 | | 1 | 3 | 7 | **12** |
| **úr enskum** | 1 | | 2 | | 20 | **23** |
| **úr norskum** | | | 1 | 1 | 1 | **3** |
| **úr svenskum** | 4 | 1 | | | 13 | **18** |
| **úr týskum** | | | | | 2 | **2** |
| **úr øðrum málum** | | | 1 | | | **1** |
| | | | | | | |
| **Týðingar tilsamans** | 6 | 1 | 5 | 4 | 45 | **61** |
| **Upphavsverk á føroyskum** | 5 | 6 | 52 | 24 | 9 | **96** |
| **Tilsamans** | **11** | **7** | **57** | **28** | **54** | **157** |

TALVA 3

**Føroysk bókaútgáva 1822-1998**

| *Tíðarskeið* | *Útkomnar á føroyskum* | *Titlar í meðal um árið* | *Fólkatalið í tíðarskeiðnum* |
|---|---|---|---|
| **1822-1899 (78 ár)** | 22 bøkur | 0,28 | 6.200-15.000 |
| **1900-1939 (40 ár)** | 197 bøkur | 4,90 | 15.000-28.000 |
| **1940-1949 (10 ár)** | 124 bøkur | 12,40 | 28.000-31.800 |
| **1950-1959 (10 ár)** | 173 bøkur | 17,30 | 31.800-34.600 |
| **1960-1969 (10 ár)** | 274 bøkur | 27,40 | 34.600-38.600 |
| **1970-1979 (10 ár)** | 686 bøkur | 66,80 | 38.600-43.200 |
| **1980-1989 (10 ár)** | 1.074 bøkur | 107,00 | 43.200-47.834 |
| **1990-1998 (9 ár)** | 1.211 bøkur | 134,56 | 47.834-44.814 |
| **1822-1998 (177 ár)** | **3.761 bøkur** | | |

TALVA 4

**Virksemið hjá skúlabókasøvnunum 1997**

| *Skúli* | *Bind 31.12* | *Vøkstur (bd.)* | *Útlán* | *Lánarar* | *Útreiðslur bókakonto* | *Samlaðar útreiðslur* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hvalbiar skúli** | 3.932 | 128 | 1.907 | 99 | 13.677 | 13.677 |
| **Felagsskúlin á Oyrarbakka** | 9.240 | | 862 | | 51.231 | 66.676 |
| **Meginskúlin á Sandi** | 7.144 | 31 | 976 | 145 | 18.279 | 61.342 |
| **Tórshavn** | | | | | | |
| **Argja skúli** | | | 11.892 | | 53.919 | |
| **Eysturskúlin** | | | 20.454 | | 58.046 | |
| **Hoyvíkar skúli** | | | 6.711 | | 41.040 | |
| **Kommunuskúlin** | | | 16.296 | | 56.745 | |
| **Skt. Frans skúli** | | | 8.367 | | 40.483 | |
| **Venjingarskúlin** | | | 17.760 | | 56.662 | |
| **Kaldbaks skúli** | | | 662 | | 17.245 | |

TALVA 5

**Virksemið hjá fólkabókasøvnunum 1997**

| *Heimstaður* | *Fólkatal 31.12* | *Bind 31.12* | *Vøkstur (bd.)* | *Útlán* | *Lánarar* | *Útreiðslur bókakonto* | *Samlaðar útreiðslur* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fuglafjørður** | 1.456 | 13.756 | 197 | 3.204 | 1.518 | 41.404 | 316.966 |
| **Giljanes** | 1.638 | 8.359 | 255 | 2.810 | 190 | 35.755 | 67.777 |
| **Glyvrar** | 2.361 | 11.384 | 318 | 7.320 | 480 | 54.382 | 75.516 |
| **Hvalvík** | 317 | 3.534 | 162 | 522 | 338 | 26.334 | 50.468 |
| **Klaksvík** | 4.932 | 23.209 | - 6 | 19.568 | 3.823 | 233.480 | 1.034.673 |
| **Kollafjørður** | 911 | 9.487 | 175 | 423 | 161 | 22.069 | 45.816 |
| **Leirvík** | 806 | 5.925 | 241 | 1.704 | 123 | 38.260 | 133.675 |
| **Oyrarbakki** | 448 | 3.635 | 116 | 663 | 71 | 20.036 | 38.048 |
| **Strendur** | 974 | 11.838 | 816 | 8.000 | 830 | 78.547 | 136.579 |
| **Sørvágur** | 891 | 10.002 | | 944 | 115 | 25.663 | 57.583 |
| **Toftir** | 1.069 | 7.701 | 294 | 7.252 | 340 | 68.692 | 103.010 |
| **Tórshavn** | 15.844 | 60.345 | - 1.323 | 71.648 | 10.495 | 1.169.587[45] 6 | 4.850.531 |
| **Tvøroyri** | 1.787 | 10.782 | 598 | 2.452 | 426 | 45.846 | 81.692 |
| **Vágur** | 1.396 | 14.095 | 469 | 4.265 | 820 | 118.207 | 239.199 |
| **Vestmanna** | 1.150 | 12.744 | 115 | 7.071 | 281 | 81.730 | 183.050 |
| **Tilsamans 1997** | **35.980** | **206.796** | **2.427** | **137.846** | **20.011** | **2.059.992** | **7.414.583** |

[4] *íroknað bókakeyp til 7 skúlabókasøvn*

TALVA 6

**Føroysk bókaútgáva 1999**

| | *Fagurbókmentir* | | | | *Yrkisbókmentir* | | | *Skúla- og lærubøkur* | | | *Barna- og ungdómsbøkur* | | | *Tilsamans* | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Óbund ið mál | bundið mál | Síður | kr. | bøkur | síður | kr. | bøkur | síður | kr. | bøkur | síður | kr. | bøkur | síður | kr. |
| **Upprunaverk** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **Prentað í Føroyum** | 5 | 6 | 1832 | 1475 | 33 | 4978 | 3807 | 8 | 544 | 628 | 4 | 247 | 310 | 56 | 7601 | 6220 |
| **Prentað uttanlands** | 1 | 1 | 233 | 300 | 24 | 7674 | 4693 | 1 | 216 | 280 | 1 | 224 | 236 | 28 | 8347 | 5509 |
| **Týðingar** | | | | | | | | | | | | | | | | |
| **Prentað í Føroyum** | 1 | 1 | 447 | 340 | 2 | 309 | 150 | 2 | 487 | 460 | 10 | 1738 | 1311 | 16 | 2981 | 2261 |
| **Prentað uttanlands** | 1 | | 125 | 100 | 9 | 1089 | 625 | | | | 11 | 444 | 1192 | 21 | 1658 | 1917 |
| **Bøkur tils. 1999** | **8** | **8** | | | **68** | | | **11** | | | **26** | | | **121** | | |
| **Síður tils. 1999** | | | **2637** | | | **14050** | | | **1247** | | | **2653** | | | **20587** | |
| **Krónur tils. 1999** | | | | **2215** | | | **9275** | | | **1368** | | | **3049** | | | **15907** |
| **Bøkur tils. 1998** | 11 | 7 | | | 57 | | | 28 | | | 54 | | | 157 | | |
| **Bøkur tils. 1997** | 10 | 5 | | | 47 | | | 22 | | | 45 | | | 129 | | |
| **Bøkur tils. 1996** | 13 | 3 | | | 51 | | | 23 | | | 50 | | | 140 | | |

TALVA 7

**Føroysk bókaútgáva 1999 -** býtt eftir máli

| | *Fagurbókmentir* | | *Yrkis-bókmentir* | *Skúla- og lærubøkur* | *Barna-bøkur* | *Til-samans* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | óbundið mál | bundið mál | | | | |
| **Týðingar til føroyskt** | | | | | | |
| **úr amerikonskum** | | | 1 | | 1 | **2** |
| **úr donskum** | | | 1 | 1 | 2 | **4** |
| **úr enskum** | 1 | | 4 | 1 | 8 | **14** |
| **úr norskum** | | 1 | 1 | | 4 | **6** |
| **úr svenskum** | 1 | | 1 | | 5 | **7** |
| **úr týskum** | | | | | 1 | **1** |
| **úr øðrum málum** | | | 3 | | | **3** |
| | | | | | | |
| **Týðingar tilsamans** | 2 | 1 | 11 | 2 | 21 | **37** |
| **Upphavsverk á føroyskum** | 6 | 7 | 57 | 9 | 5 | **84** |
| **Tilsamans** | **8** | **8** | **68** | **11** | **26** | **121** |

TALVA 8

**Føroysk bókaútgáva 1980-1999**

| ***Ár*** | ***Fagurbókmentir*** | | | | ***Yrkis-bókmentir*** | | ***Skúla- og lærubøkur*** | | ***Barnabøkur*** | | ***Bøkur tilsamans*** | | ***Síður*** | ***Krónur*** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | óbundið mál | | Bundið mál | | | | | | | | | | | |
| **1980** | 8 | (3) | 9 | | 24 | (3) | 19 | (4) | 33 | (24) | 93 | (34) | 8.953 | 5.200 |
| **1981** | 7 | (5) | 11 | (3) | 35 | (6) | 14 | (8) | 29 | (24) | 96 | (46) | 8.182 | 5.300 |
| **1982** | 11 | (5) | 8 | (2) | 30 | (5) | 25 | (7) | 18 | (13) | 92 | (32) | 8.650 | 5.450 |
| **1983** | 7 | (4) | 10 | (2) | 42 | (13) | 13 | (2) | 26 | (14) | 98 | (35) | 11.732 | 6.044 |
| **1984** | 10 | (6) | 8 | | 49 | (13) | 10 | (2) | 18 | (12) | 95 | (33) | 11.503 | 6.990 |
| **1985** | 10 | (3) | 9 | | 47 | (9) | 7 | | 26 | (21) | 99 | (33) | 11.563 | 8.626 |
| **1986** | 11 | (6) | 11 | (2) | 39 | (8) | 9 | (2) | 43 | (37) | 113 | (55) | 10.686 | 9.057 |
| **1987** | 6 | | 9 | | 35 | (8) | 13 | (4) | 46 | (37) | 109 | (49) | 9.946 | 11.206 |
| **1988** | 12 | (4) | 11 | | 32 | (6) | 18 | (8) | 58 | (53) | 131 | (71) | 16.125 | 16.863 |
| **1989** | 5 | (2) | 2 | | 44 | (6) | 23 | (11) | 74 | (67) | 148 | (86) | 16.159 | 17.617 |
| **1990** | 11 | (4) | 7 | (1) | 48 | (7) | 31 | (7) | 64 | (53) | 161 | (72) | 18.674 | 19.656 |
| **1991** | 12 | (7) | 3 | | 32 | (8) | 7 | (5) | 65 | (50) | 119 | (70) | 13.879 | 13.395 |
| **1992** | 7 | (3) | 5 | (2) | 39 | (11) | 23 | (8) | 43 | (33) | 117 | (57) | 13.701 | 13.571 |
| **1993** | 7 | (2) | 4 | (1) | 34 | (8) | 23 | (6) | 36 | (30) | 104 | (47) | 11.932 | 9.621 |
| **1994** | 8 | (3) | 7 | (1) | 39 | (9) | 35 | (18) | 40 | (36) | 129 | (67) | 15.040 | 12.315 |
| **1995** | 9 | (3) | 3 | | 62 | (9) | 28 | (12) | 53 | (50) | 155 | (74) | 20.669 | 17.316 |
| **1996** | 13 | (6) | 3 | (1) | 51 | (9) | 23 | (5) | 50 | (43) | 140 | (64) | 19.401 | 16.539 |
| **1997** | 10 | (4) | 5 | (1) | 47 | (9) | 22 | | 45 | (40) | 129 | (54) | 17.182 | 14.392 |
| **1998** | 11 | (6) | 7 | (1) | 57 | (5) | 28 | (4) | 54 | (45) | 157 | (61) | 28.452 | 19.850 |
| **1999** | 8 | (2) | 8 | (1) | 68 | (11) | 11 | (2) | 26 | (21) | 121 | (37) | 20.587 | 15.907 |
| **1980-1999** | 183 | (78) | 140 | (18) | 854 | (163) | 382 | (115) | 847 | (703) | 2406 | (1077) | | |

TALVA 9

**Føroysk bókaútgáva 1822-1999**

| *Tíðarskeið* | *Útkomnar á føroyskum* | *Titlar í meðal um árið* | *Fólkatalið í tíðarskeiðnum* |
|---|---|---|---|
| **1822-1899 (78 ár)** | 22 bøkur | 0,28 | 6.200-15.000 |
| **1900-1939 (40 ár)** | 197 bøkur | 4,90 | 15.000-28.000 |
| **1940-1949 (10 ár)** | 124 bøkur | 12,40 | 28.000-31.800 |
| **1950-1959 (10 ár)** | 173 bøkur | 17,30 | 31.800-34.600 |
| **1960-1969 (10 ár)** | 274 bøkur | 27,40 | 34.600-38.600 |
| **1970-1979 (10 ár)** | 686 bøkur | 66,80 | 38.600-43.200 |
| **1980-1989 (10 ár)** | 1.074 bøkur | 107,00 | 43.200-47.834 |
| **1990-1999 (10 ár)** | 1.332 bøkur | 133,20 | 47.834-45.404 |
| **1822-1999 (178 ár)** | **3.882 bøkur** | | |

TALVA 10

**Virksemið hjá skúlabókasøvnunum 1998**

| *Skúli* | *Bind 31.12* | *Vøkstur (bd.)* | *Útlán* | *Lánarar* | *Útreiðslur bókakonto* | *Samlaðar útreiðslur* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hvalbiar skúli** | 3.886 | 82 | 1.925 | 111 | 21.735 | 31.735 |
| **Felagsskúlin á Oyrarbakka** | 9.592 | 352 | 1.146 | | 92.758 | 98.206 |
| **Meginskúlin á Sandi** | 7.193 | 49 | 1.045 | 145 | 45.050 | 56.249 |
| **Tórshavn** | | | | | | |
| **Argja skúli** | | | 11.532 | | 63.286 | |
| **Eysturskúlin** | | | 17.643 | | 59.508 | |
| **Hoyvíkar skúli** | | | 11.456 | | 44.386 | |
| **Kommunuskúlin** | | | 15.483 | | 61.876 | |
| **Skt. Frans skúli** | | | 9.132 | | 45.414 | |
| **Venjingarskúlin** | | | 14.712 | | 60.246 | |
| **Kaldbaks skúli** | | | | | 23.136 | |

TALVA 11

**Virksemið hjá fólkabókasøvnunum 1998**

| *Heimstaður* | *Fólkatal 31.12* | *Bind 31.12* | *Vøkstur (bd.)* | *Útlán* | *Lánarar* | *Útreiðslur bókakonto* | *Samlaðar útreiðslur* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fuglafjørður** | 1.465 | 14.033 | 277 | 2.659 | 1.188 | 78.637 | 357.609 |
| **Giljanes** | 1.633 | 8.549 | 203 | 2.695 | 183 | 27.521 | 78.787 |
| **Glyvrar** | 2.394 | 11.742 | 358 | 7.360 | 495 | 45.512 | 79.974 |
| **Hvalvík** | 345 | 3.781 | 247 | 570 | 418 | 35.185 | 64.705 |
| **Klaksvík** | 4.605 | 21.330 | 1.260 | 17.766 | | 234.463 | 963.844 |
| **Kollafjørður** | 904 | 9.710 | 223 | 476 | 149 | 30.138 | 85.998 |
| **Leirvík** | 806 | 6.162 | 237 | 2.048 | 125 | 30.125 | 107.148 |
| **Oyrarbakki** | 449 | 3.936 | 301 | 764 | 78 | 43.953 | 52.073 |
| **Strendur** | 988 | 12.212 | 374 | 7.000 | 360 | 46.098 | 122.970 |
| **Sørvágur** | 895 | 10.002 | | 944 | 115 | 18.940 | 119.681 |
| **Toftir** | 1.097 | 7.792 | 91 | 6.220 | 350 | 70.675 | 99.486 |
| **Tórshavn** | 16.101 | 61.933 | - 3.391 | 69.901 | 11.192 | 1.156.824[7] | 4.916.012 |
| **Tvøroyri** | 1.793 | 10.822 | 339 | 1.497 | 926 | 46.001 | 94.826 |
| **Vágur** | 1.419 | 14.595 | 543 | 3.687 | 783 | 155.106 | 299.742 |
| **Vestmanna** | 1.154 | 13.090 | 365 | 6.799 | 219 | 72.465 | 184.761 |
| **Tilsamans 1998** | **36.048** | **209.689** | **1.427** | **130.386** | **16.581** | **2.091.643** | **7.627.616** |

[7] *Íroknað bókakeyp til 7 skúlabókasøvn*

FLB